GRANSKINGARDEPILIN FYRI ØKISMENNING

# SØKIR EFTIR GRANSKARA

Granskingardepilin fyri Økismenning søkir eftir granskara – búskaparfrøðingi, samfelagsfrøðingi, ella líknandi – at byrja skjótast gjørligt. Talan er um eitt verkætlanarsett starv, sum í fyrsta umfarið gongur fram til ársenda 2006.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna um ymiskar granskingarverkætlanir. Meiri ítøkiligt fevnir arbeiði m.a. um at fyrireika verkætlanir, savnað inn tilfar, viðgera, greina og tulka tilfarið og leggja tað fram skrivliga og munnliga.

**Vit kunnu bjóða**
Granskingardepilin fyri Økismenning er eitt spennandi arbeiðspláss við skiftandi granskingar uppgávum, fevnandi um føroyskar verkætlanir eins væl og verkætlanir, sum verða gjørdar í samstarvi við útlendskar granskarar og granskingarstovnar. Granskingardepilin fyri Økismenning átekur sær eisini umbidnar verkætlanir fyri stovnar og feløg í Føroyum og uttanlands.

Við starvinum fylgja eisini møguleikar at taka lut í altjóða ráðstevnum og verkstovum út í heimi eins væl og í Føroyum.

Granskingardepilin fyri Økismenning hevur skrivstovur í Vági og í Klaksvík. Arbeiðsstaðurin er í hesum førinum í Vági, men eru tó góðir møguleikar fyri lagaligum skipanum hesum viðvíkjandi.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava lokið universitetsútbúgving innan búskaparfrøði, samfelagsfrøði, ella líknandi útbúgving.

Tað er ein fyrimunir – men ikki eitt krav – at ein hevur royndir sum granskari ella frá arbeiði í øðrum granskingarumhvørvum.

Vit vænta, at tú ert førir fyri at arbeiða sjálvstøðugt, umframt at samstarva við onnur starvsfólk í smb. við granskingarverkætlanir.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

**Umsóknarfreist**
Umsóknarfreistin er 8. mars 2006. Umsóknir við prógvum, ævisøgu (Curriculum Vitae), viðmælum og øðrum skulu sendast:

**Granskingardepilin fyri Økismenning, Postboks 18 900 Vágur**

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Dennis Holm, á teldupostadressuni dennis@region.fo ella á tlf. 374477.

GRANSKINGARDEPILIN FYRI ØKISMENNING
Postboks 18 • 900 Vágur • www.region.fo

# Møtirøð við Jens Peder Pedersen í SARON í Vestmanna



| | | | |
|---|---|---|---|
| Hóskvøldið | 23. februar | kl. 20.00 | Evangeliskt møti |
| Fríggjakvøldið | 24. februar | kl. 20.00 | Evangeliskt møti |
| Leygardag | 25. februar | kl. 20.00 | Evangeliskt møti |
| Sunnumorgun | 26. februar | kl. 11.00 | Morgunmøtið við breyðbróting |
| Sunnukvøldið | 26. februar | kl. 18.00 | Evangeliskt møti |

**Jesus Kristus er hin sami í gjár og í dag og í allar ævir.**

**Heilsan við orðum JESUSAR:**
*Verða tveir tykkara á jørðini samsintir um at biðja um okkurt - veri, hvat tað vera má - tað skal verða teimum givið av Faðir Mínum, sum í Himli er.*

**Eftir kvøldmøtini bjóða vit til kaffi.**
**Møguleiki er eisini fyri persónligari samtalu.**

## Hjartaliga vælkomin til møtini !!!

# Hvussu stimbra vit partaeigaramentanina í Føroyum?

**Almennur kjakfundur**

Mikudagin 22. februar kl. 19.30 skipar Fólkaflokkurin í Suðurstreymi fyri almennum kjakfundi í Miðlahúsinum í Vágsbotni, har partaeigaramentanin í Føroyum er á dagsskránni.

Í pallborðum verða umboð fyri bankaheimin, vinnuna og fólkaflokkin.

**Fólkaflokkurin**

# Almenn móttøka á Landssjúkrahúsinum

*Almenn móttøka verður í nýggju forhøllini á Landssjúkrahúsinum hósdagin 23. februar 2006 kl. 14 - 16 í sambandi við at gamli høvuðsbygningurin og nýbygningurin eru liðugt samanbygdir og nýggj høvuðsinngongd verður tikin í brúk.*

*Landssjúkrahúsið*

NORÐOYAREDAKTIÓNIN



í Nólsoyar Pálsgøtu 1, fer í framtíðini at hava opið soleiðis:

**Mánadag kl. 09-12**
Vakthavandi: Vilmund Jacobsen

**Mikudag kl. 09-12**
Vakthavandi: Snorri Brend

**Hósdag kl. 09-12**
Vakthavandi: Anna Ellingsgaard

So um tit hava tíðindi, heilsanir, lýsingar til lýsingartorgið, tilfar til Nøvn í vikuni og annað viðkomandi sum norðoyingar ynskja at fáa við í blaðið, so støkk inn á gólvið hjá okkum.
*Eisini ber til at gjalda fyri lýsingar og heilsanir á redaktiónini*

Sosialurin

NÓLSOYAR PÁLSGØTA 1 · TEL 458686 · FAX 458687 · T-POST: KLAKSVIK@SOSIALURIN.FO

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo